# Sct. Johannes Kantori úr Herning vitjar Føroyar



Í hesi vikuni vitjar kórið »Sct. Johannes Kantori« Føroyar. Hetta kórið er frá Herning, har tað er ein partur av kórvirkseminum í Sct. Johannes Kirke. Urguleikarin har á staðnum, Bjarne Hersbo, stovnaði kórð í 1976 og hevur í nógv ár verið leiðari av hesum kóri. Seinastu árini hevur Irma Andersen, sum er urguleikari í Brande, havt kórið. Bjarne Hersbo spælir urgu til tær konsertir, sum kórið hevur. Í kórinum eru 18 sangarar og 16 av hesum eru við í ferðini til Føroyar. Teir eru allir royndir sangarar og hava verið við á ferðum, har kórið hevur havt konsertir m. a. í París, Wien, Berlin og Warzsawa.

Kórið fer at hava konsert í Havnar kirkju, Eiðis kirkju og í Tofta kirkju. Á skránni eru sangir av donskum og útlendskum tónaskøldum. Millum annað Morgensang af Elverskud av Gade og morgun- og kvøldsálmar av Ingemann og Weyse. Tey fara eisini at syngja tónleik av Grieg og Fauré og kenda Halleluja-kórið hjá Händel er eisini við á skránni. Bjarne Hersbo fer at spæla urgu og presturin í Brande kirkju, Arne Holst-Larsen, fer at lesa tekstir, sum sjóða fjølbroyttu skránna saman til eina eind.

### Konsertirnar verða hesar:

**Týsdag 9. juni**
**í Havnar Kirkju**

**Mikudag 10. juni**
**Fríðrikskirkjuni á Toftum**

**Fríggjadag 12. juni**
**í Eiðis Kirkju**

**Leygardag 13. juni kl. 11.30 Matiné í**
**Havnar Kirkju**

**Allar konsertirnar**
**byrja kl. 19.30**










